# Tá ið amtmaðurin fór at keypa epli

## – dømi um leiklutin hjá tí almenna í broytingunum í 19. øld[1]

## *Potato growing in the Faroe Islands in 19th century*

***Erling Isholm***
Fróðskaparsetur Føroya – Søgu- og samfelagsdeildin
J. Broncksgøta 25, 100 Tórshavn, erlingi@setur.fo

### Úrtak
Tíðliga í 19. øld varð av álvara farið undir at velta epli í Føroyum, og eplini høvdu stóran týdning fyri traðarmenn, sum løgdu nógvar traðir inn í 1820- og 30-árunum. Traðirnar vóru grundarlag undir vøkstrinum í fólkatalinum og øktari velting. Embætismenn fylgdu væl við, hvussu gekst hjá hesum nýggja samfelagsbólki, og teir fylgdu eisini væl við veltingini. Sum 1830-árini liðu, komu alsamt størri og størri trupulleikar undan kavi við seteplunum. Onkur sýslumaður óttaðist fyri, at nógva nýveltingin fór at steðga, tí tað var so torført at fáa fatur á seteplum, og aðrir óttaðust fyri støðuni hjá traðarmonnum, tí seteplagóðskan bara versnaði, og minni og minni kom burtur úr veltingini. Í hesi grein verður greitt frá søguni um eplini, sum Pløyen keypti í 1839, og víst verður á, hvussu tað við hesum eplakeypi eydnaðist almennum myndugleikum at forða fyri, at stígur kom í framburðin, sum hevði verið undanfarnu 20 árini. Eplakeypið var við Hetlandsferðini knýtt saman við fleiri aðrar tættir, sum allir høvdu til felags at nútímansgera føroyska samfelagið, sum Pløyen og aðrir arbeiddu við hesi árini. Skuldu tær eydnast, skuldi tilverugrundarlagið hjá nýggju traðarmannastættini tryggjast, tí roknast kundi ikki við, at kollveltandi samfelagsbroytingar fóru at henda í siðbundna bóndasamfelagnum.

### Abstract
The potato became an important crop in the Faroe Islands early in the 19th century and subsequently vital in the 1820s and 1830s, when crofters started to enclose and cultivate small plots of land. These plots of land were crucial in ensuring population growth and in extending cultivated land. Local officials followed these events closely. During the 1830s problems emerged concerning the

Fróðskaparrit 61. bók 2014: 52-83

quality of seed potatoes and the limited supply, problems which only intensified as time passed. Concern was raised by one sheriff that difficulties in finding new seeds would prevent the expanding cultivation, whilst others worried that the deterioration in seed quality would result in a decline in growth, thus jeopardizing the livelihood of crofters. In this article the story of seed potatoes purchased by governor Pløyen in Orkney in 1839 is followed. The point being made is that by acquiring these seed potatoes the authorities ensured that the progress of the previous 20 years continued. Furthermore, the purchasing of a shipment of seed potatoes is linked to other modernization plans for Faroese society, which governor Pløyen and others worked on at the time. For these plans to succeed, it was vital to ensure the living conditions of the crofter families as change would not emerge from the old peasant society.

## Inngangur

Verður hugt at yvirliti yvir fólkatal í Vestureuropa upp gjøgnum søguna, sæst, at vøksturin í fólkatalinum tók dik á seg í 18. øld, og síðani øktist fólkatalið bara alsamt skjótari langt inn í 20. øld. Nógvar hugsanir eru um, hvussu hesin vøksturin kom, og sambandið millum økta vøksturin í fólkatalinum og útbreiðsluna av eplavelting er eitt evni, sum leingi hevur havt stóran áhuga millum búskaparfrøðingar, geografar og søgufólk. Adam Smith staðfesti longu í 1776 í kenda verki sínum *An Inquiry into the Nature and Causes of the Wealth of Nations*, at eplavelting á einum teigi gav tríggjar ferðir føðsluvirði, sum teigurin hevði givið, um korn varð velt á honum. Sostatt gjørdu eplini, at fleiri fólk kundu liva av somu jørð. Síðani hevur nógv kjak verið um evnið, og serliga er tað spurningurin, um útbreiðslan av eplavelting hevur ført til fólkavøkstur, ella um tað er fólkavøksturin, sum hevur skapt tørvin á at velta fleiri epli, sum granskarar hava verið ósamdir um (Nunn and Qian 2011: 595).

Í greinini *The potato's contribution to population and urbanization: Evidence from a historical experiment* (Nunn and Qian 2011) geva amerikansku búskaparfrøðingarnir Nathan Nunn og Nancy Qian sítt boð uppá, hvussu stóra ávirkan eplini høvdu á fólkavøksturin. Tey taka støði í, at eplaveltingin í Írlandi hevði týðandi ávirkan á fólkavøksturin, men fólkavøksturin sást ikki at hava havt stórvegis ávirkan á eplaveltingina (Nunn and Qian 2011: 596). Hetta var úrslit av gransking hjá íranum Joel Mokyr, sum setti sær fyri at svara spurninginum, um eplaveltingin skapti fólkavøkstur, ella tað var økta fólkatalið, sum elvdi til eplaveltingina. Nunn og Qian settu sær fyri at rokna út, hvussu stórur partur av fólkavøkstrinum í Gamla heiminum, t.e. heimurin uttanfyri Amerika, í árunum 1700 til 1900 stavaði frá, at eplini gjørdust partur av landbúnaðinum.

Úrslitið varð, at eplini áttu 25-26 prosent ella ein góðan fjórðing av vøkstrinum í fólkatalinum í Gamla heiminum (Nunn and Qian 2011: 598).

Fyrimunurin, sum eplini hava fram um aðra avgrøði, er, at nærum øll føðsluevni av týdningi eru í teimum. Í mjólk eru tær A og D vitaminirnar, sum eplini mangla, og tí ber til at fáa heilsugóðan kost burtur úr einans eplum og mjólk (Nunn and Qian 2011: 599).

Samband er millum eplavelting og fólkavøkstur á tann hátt, at eplini geva størri úrtøku úr jørðini enn frammanundan. Vaksandi úrtøka hevur hækkað livistøði við sær, og tað førir so aftur til, at bæði fertilitetur og livialdur økjast, og tey bæði gera so aftur, at fólkatalið veksur (Nunn and Qian 2011: 605). Fyrstu tíðina verður øll tann økta úrtøkan brúkt til øktan fertilitet, men við tíðini fer økta úrtøkan eisini at merkja hækkandi livistøði (Nunn and Qian 2011: 607).

Í greinini *Veðurlag, framleiðsla og fólkatal í 1800-talinum og fyrr* hevur geografurin Rolf Guttesen eina mynd, sum vísir gongdina í fólkatalinum í Føroyum frá 1720 til 1830. Gongdin minnir nógv um gongdina í heimsins íbúgvatali, men stóra økingin í vøkstrinum er væl seinni í Føroyum. Fólkatalið fór av álvara at vaksa umleið 1780 og fram til 1800. Síðani stóð talið í stað fram móti endanum á Napoleonskrígnum í 1814, men næstu 20 árini vaks talið við 1,42 % um árið. Tað merkir, at fólkatalið hesi 20 árini vaks fýra ferðir so skjótt, sum tað í miðal hevði gjørt undanfarnu 90 árini. Í greinini verður spurt, hví so mundi vera (Guttesen 2010: 58).

Roynt verður í somu grein at svara spurninginum, og fýra tættir verða nevndir sum møguligar orsøkir til vøksturin í fólkatalinum. 1) ein nýggjur samfelagsklassi tók seg upp, sum livdi av traðarbrúki og útróðri, 2) ein nýggj meira modernað miðfyrisiting við vælútbúnum embætismonnum varð bygd upp, 3) embætismenn tóku stig til, at handilin spakuliga læt upp fyri nýggjum møguleikum, m.a. nýggjum úthandlum á Tvøroyri, í Klaksvík og í Vestmanna, og 4) nýggjar niðursetubygdir komu (Guttesen 2010: 60).

Rolf Guttesen hevur út frá Løbners tabellum frá 1813 roknað seg fram til, at mjólkin var nógv størsta kaloriukeldan hjá føroyingum. 42 % av kaloriunum komu frá mjólkini. Innflutt korn var 24 % av føðini, meðan føroyska kornið bara var 8 %. Seyðurin gav í kjøti og tálg slakan fimting av kaloriunum, og fiskur bara 8 % (Guttesen 2010: 45). Epli vóru ikki við í listanum hjá Løbner, og tí metir Guttesen, at tey ikki høvdu fingið nakran serligan týdning tá (Guttesen 2010: 46). Niðurstøðan hjá Guttesen er tí, sum hann eisini hevur víst á í øðrum greinum, at mjólkin var høvuðskaloriukeldan í bóndasamfelagnum, og mjólkin var harumframt einasta stabila kaloriukeldan við smáum útsvingum í úrtøkunum frá ári til árs (Guttesen 2010: 49).

Staðfestingin av, at mjólk var høvuðskaloriukeldan í føroyska samfelagnum um tað mundið, tá ið eplini byrja at fáa týdning, er sera áhugaverd, tí C. Justin Cook hevur í greinini *Potatoes, Milk, and the Old World Population Boom* víst á, at ávirkanin, sum eplini sambært Nunn og Qian høvdu á fólkavøkstur, vaks alt eftir, hvussu stór nýtslan av mjólk og mjólkarvørum var í ymisku londunum (Cook 2013: 18).

Cook roynir í grein síni at byggja víðari á kanningina hjá Nunn og Qian, og hansara hypotesa er, at um tveir bøndur fóru at velta epli, so kundi tann bóndin, sum eisini hevði mjólk, føða eina heila familju. „Milk is high in fats and proteins, while potatoes contain high amounts of calories relative to other staple crops," sigur Cook, og hansara útrokningar vísa, at ein bóndi kláraði seg við einum litri av mjólk og fimm eplum um dagin (Cook 2013: 3). Cook tók mát fyri laktosutoleransu við í útrokningarnar, og úrslitið varð, at ávirkanin frá eplunum meir enn tvífaldaðist í londum, har nærum full laktosutoleransa var (Cook 2013: 13). Í Føroyum eru tey fá í tali, sum ikki tola mjólk, og tí er laktosutoleransan heilt stór, eins og hon er í hinum Norðurlondunum.

## Spurningar

Leggja vit tær tríggjar staðfestingarnar saman, sum greitt er frá omanfyri, geva tær eina greiða mynd av, at epli høvdu stóran týdning fyri fólkavøksturin í 19. øld. Eingin orsøk er at ivast í, at henda meting eisini er galdandi fyri Føroyar. Eplini vaksa ikki líka væl sum í heitari londum, men tey trívast væl betur enn onnur avgrøði, so lutfalsliga munnu eplini hava havt minst líka stóran týdning í Føroyum sum í londum, har eplini kappast við nógva aðra avgrøði.

Cook hevur víst á, at eplini fingu serliga stóran týdning, har mjólk frammanundan hevði nógv at siga, tí saman fevndu mjólk og epli um øll tey føðsluevni og vitaminir, sum menniskjum tørvar, og tá Guttesen í fleiri greinum hevur víst á, at mjólk fyrst í 19. øld var nærum helmingurin av kaloriunum í føroyska húsarhaldinum, er lítið at ivast í, at Føroyar eisini hava verið væl og virðiliga fevndar av hesi ávirkan.

Taka vit støði í hesum teorium, er økt eplavelting besta frágreiðingin upp á tvær av teimum fýra orsøkunum, sum Rolf Guttesen setti fram, tí saman við kúnni vóru eplini grundarlag undir, at ognarleys kundu festa búgv og liva av traðarbrúki, og tað sama var galdandi fyri nýggjar niðursetubygdir. Tað samsvarar væl við aðrar upplýsingar, tí almennir myndugleikar royndu við fyriskipanini um velting og tænastufólk frá 1777 at seta ferð á velting í Føroyum, men hvørki hon ella ein uppfylgjandi fyriskipan frá 10. apríl 1780 settu stórvegis ferð á at

økja um velt lendi (Nolsøe and Jespersen 2009b: 131). Gongd kom ikki á at leggja traðir inn fyrr enn umleið 1820, og tað er um somu tíð, sum eplavelting gjørdist vanlig í Føroyum (Guttesen 2005: 156).

Í hesi grein verður søgan um orknoysku eplini, sum Pløyen amtmaður keypti á tiltiknu Hetlandsferðini í 1839, lýst, og spurningurin er, um hetta eplakeyp er dømi um tann leiklut, sum vælútbúnu embætismenninir í fyrisitingini høvdu í menningini av føroyska samfelagum í 19. øld. Roynt verður eisini at svara, um embætismenninir sóu, hvørja ávirkan eplaveltingin hevði, og hvør teirra leiklutur var í at tryggja, at Føroyar gjørdust partur av menningini og fólkavøkstrinum, sum eplaveltingin hevði um allan heim. At enda verður roynt at geva nøkur boð uppá, hvørjar víðari avleiðingar kunnu hugsast at hava verið av hesum virksemi.

## Fyrstu royndirnar at velta epli í Føroyum

Hildið verður, at epli á fyrsta sinni eru nevnd í Føroyum í 1686, tá prestakonan í Norðurstreymoy hevði verið umborð á fremmandum skipi í Haldarsvík, har hon hevði keypt brennivín, klæði, leður og epli (Andersen 1964: 131). Eins og í øðrum londum vóru prestar undangongumenn í eplaveltingini í Føroyum, men fyrstu tíðina var torført at fáa undirtøku fyri nýggju avgrøðini. Tað sigst, at Peter Arrheboe hevði epli við sær, tá hann kom til Føroya í 1706. Hann velti í tvey ár, men hann fekk ongan at eta tey, og tá sjálvt Beinta ikki vildi eta tey, gav hann upp (Haraldsen 1985: 23).

Tað sama upplivdi Christian Gotlieb Schrøter, sum kom til Føroya sum landkirurgur í juli 1756. Hann royndi í 1758 at velta epli, men eingin tók við hugskotinum. Sjálvur segði Schrøter í eini frágreiðing frá 1764, at hann var tann fyrsti at velta epli í Føroyum (Schrøter 1836: 120).[2]

Sambært Jens Christian Svabo var vantandi vitan orsøkin til, at føroyingar ikki vildu taka við eplunum. Sum tann upplýsingarmaður hann var, avgjørdi hann at bøta um støðuna. Hann gav í 1773 út bóklingin *Kort ekonomisk Underretning om Kødsaltning, Svin, Kartofler og Haver. Uddragen af andre til den færøske Landmands Nytte*. Um ársskiftið bað hann myndugleikarnar í Keypmannahavn stuðla sær við útreiðslunum og við at geva út fleiri hefti. Embætismenn í upplýsta einaveldinum vóru ávirkaðir av somu upplýsingarhugsanum sum Svabo. 28. februar 1774 varð avgjørt, at bóklingarnir skuldu gevast út fyri kongliga rokning, men onkursvegna gjørdist henda ætlan ongantíð til veruleika (Bjørk 1984: 13).

Myndugleikarnir royndu hesi árini at brúka bæði gularót og písk at fáa føroyingar at velta epli. Virðislønir skuldu latast til teirra, sum gjørdu serliga nógv við velting, og í festibrævi til festara í Kirkjubø varð í 1778 álagt festaranum at

velta epli.[3] Hetta var um somu tíð, sum fyriskipanin um velting og tænastufólk frá 1777, ofta nevnd Trælalógin, varð kunngjørd. Endamálið við lógini var at økja um veltingina í Føroyum, men samstundis vóru ásetingar, sum høvdu til endamáls at steðga fólkavøkstri, sum t.d. illa dámda giftingarbannið. Hugsandi er, at hesi bæði endamálini skákaðu hvørt annað, og tí øktist velta lendið ikki so nógv, sum ætlanin var.

Nakað av gongd kom á eplaveltingina síðstu árini av 18. øld, og okkurt tekin er um innflutning av seteplum í størri nøgdum. 20. apríl 1786 kom skipið „The Robert" á Havnina úr Stornoway í Hebridunum. Á Skansanum skrásettu teir, at skipið var lastað við breyði og eplum.[4] Hetta var einastu ferð, at epli vórðu nevnd í skansaprotokollunum árini 1783-1840. Hetta er í endanum á Vágsbotnstíðini, tá ið skipaferðslan á Havnina var munandi størri enn bæði áðrenn og aftaná. Úr Bretlandi komu skip eftir vøru, og hugsandi er, at tey eisini royndu at taka vøru við sær henda vegin, og tað kann hava havt sítt at siga fyri, at eplini gjørdust meira vanlig. Í 1787 fóru teir í Rybergs handli at rigga av í Vágsbotni, og stutt eftir tað fánaði sambandið við Bretland.

## Eplini gerast vanlig í Føroyum

Um somu tíð vóru stórar byltingar í Fraklandi, og kollveltingin har í 1789 førdi stórar partar av Europa út í kollveltingarkríggj og seinni aftur í Napoleonskríggj, sum endaðu í 1815. Kríggini høvdu stóra ávirkan á samferðslu og samhandil, og serliga eftir at bretar lupu á Keypmannahavn í 1807, gjørdist støðan torfør í ríkinum. Bæði í Føroyum og Noregi stóð hungursneyðin í durunum. Í Noreg verður hildið, at tað var óttin fyri hesi hungursneyðini, sum fekk norðmenn at velta epli í stórum tali, og longu í 1830 staðfesti hagfrøðingurin Jens Kraft, at eplini nú vóru „almuens kjæreste føde" (Sejersted 1978: 105).

26. juni 1814 kom sluppin „Nancy" á Vestaru vág. Hon var lastað við salti og eplum til Noregs, men svenskir kaparar blokeraðu Noreg, og tí kom sluppin til Havnar at leggja lastina upp. Sluppin var úr Stornoway, men lastin kom úr Liverpool.[5] Síðst í juni hevur verið nakað seint at seta eplini niður, so hesi eplini úr Liverpool endaðu helst í pottinum.

Í Føroyum tykist vantandi sambandið at hava havt eina heilt aðra ávirkan enn í Noregi, tí í 1811 vóru so at siga eingi epli velt í Føroyum. Bara 120 tunnur vóru tiknar upp, og av teimum vóru 100 í Suðuroy og 20 í Havn (Debes, H. J. 2000: 236). Aðrar keldur geva ábending um, at hesi eplini vóru tey hjá Schrøter presti í Hvalba og á Skansatrøðni í Havn (Guttesen 2005: 155). Um hetta er eftirfarandi, er líkt til, at eplaveltingin aðrastaðni í landinum var dottin niðurfyri aftur.

Tá ið friður aftur var í Europa, og ferðasambandið kom í rætt lag aftur, bar

helst eisini til at fáa setepli. Kongligi handilin sær ikki út til at hava havt setepli í sínum vøruúrvali, men fólk høvdu møguleika fyri at fáa smærri nøgdir av vøru sendandi sum sendingsgóðs.[6] Frá 1813 hevði handilshúsið Horne & Stackhouse í Liverpool loyvi at selja neyðsynjarvørur í Føroyum, og J.H. Schrøter ivaðist í 1850 ikki í, at tað var hesin handil, sum fekk gongd á eplaveltingina í Føroyum (Nolsøe and Jespersen 2009a: 219). Skipið „The Victory“ hjá handilsfelagnum kom á Vág á vári 1814. Millum tey tingini, sum suðuroyingar keyptu, vóru 50 tunnur av eplum, og sambært Schrøter fóru hesi eplini við tíðini kring allar Føroyar (Nolsøe and Jespersen 2009a: 267). Kend er søgan um fyrsta eplið, sum kom til Gjáar. Oyrarbóndin hevði fingið set frá Mariu Rønning, og vitanina um eplavelting hevði hann frá einum húskalli, sum hevði lært at velta hjá Schrøter presti í Hvalba. Tað eina seteplið, sum Oyrarbóndin hevði við sum tinganest til jóla, gav árið eftir eina sneis, og næsta árið aftur fingu tey eina skeppu burturúr (Debes, H. M. 1977: 7–11).[7] Sambært sama Schrøter komu havnardreingir til Suðuroyar at læra seg at velta epli, og teir gjørdust eftirspurdir húskallar kring landið (Nolsøe and Jespersen 2009b: 157).

Árini eftir Napoleonskríggini gjørdust eplini alsamt vanligari. Í 1820 setti Norðoya sýslumaður niður á garði sínum á Norðoyri (Guttesen 2005: 156), og í 1830 vóru eplaveltur í flestum bygdum í Føroyum. Tað árið var samlaða úrtøkan næstan 10.000 tunnur sambært Schrøter, men helst er hetta talið nakað høgt, tí sambært almennum hagtølum gjørdist eplaframleiðslan ikki so stór fyrr enn í 1880-árunum (Nolsøe and Jespersen 2009b: 279). Ein orsøk til øktu veltingina var, at í 1827 hækkaði prísurin á korni, og tað fekk fleiri at velta korn og serliga at seta niður epli á nýinnlagdar traðir (Nolsøe and Jespersen 2009a: 241). Hesi somu árini vaks fólkatalið við 1500 fólkum upp á 20 ár (Guttesen 2010: 58). Í ritgerð síni hevur Karsten Sedal sagt um 1830-árini, at „denne periode kan måske betragtes som en slags „Gründerperiode“ for de færøske trøbrug og udflytterbygder“ (Sedal 1983: 157).

## Hóttafall kemur á veltingina[8]

Myndugleikarnir fegnaðust um økta fólkatalið og øktu veltingina, og frá 1830 eru regluligar frágreiðingar um støðuna í sýslunum. Í frágreiðingum frá sýslumonnum í Norðoyggjum, Eysturoy og Suðuroy eru nývelting og epli ikki nógv umrødd. Nevnt verður líka, hvussu úrtøkan hevur verið hvørt árið, men annars eru teir pírnir við frágreiðingum um orsøkir og hugskotum til ábøtur.

Hentze sýslumaður á Sandi gjørdi eitt sindur meira burtur úr sínum frágreiðingum. Longu í 1831 staðfesti hann, at „Kartøfler er en Artikel, som paa mange Steder heri Sysselet ere anseete for vigtige i Huusholdningen.“ Tí høvdu

sandoyingar velt nógv, men ein misvøkstur í 1829 fekk fleiri at fara frá tí aftur. Í 1831 var úrtøkan kortini so góð, at nú vóru tey fleiri, sum ætlaðu sær at leggja eyka orku í eplavelting í framtíðini. Í 1833 var hann minni positivur, tí ov lítið kom undan. Tað var ikki støddin á eplunum, men heldur tað, at eplini vóru so fá. 5 og 6 fold var gott, 3 og 4 vanligt, og nøkur fingu minni. Sýslumaðurin gjørdi sær sínar hugsanir um hesa støðuna við teimum royndunum, hann hevði. Hann mintist, at eplini fyri nøkrum árum síðan um várið spíraðu við 3, 4 ella fleiri sprotum, men nú vóru bara ein ella tveir sprotar á, um nakar var yvirhøvur, og tí kom bara tað sama upp um heystið, sum varð sett niður um várið, og nú vóru eplini eisini full í vatni. Hetta fær illa verið annað enn ein staðfesting av, at ein set versnar við tíðini, og at tørvur tí er á at fáa nýggja set við jøvnum millumbilum.

Í 1833 varð loyvi givið til at girða inn og velta eina trøð í Skopun, men í september 1834 harmaðist sýslumaðurin um, at trøðin framvegis ikki var gird, tí tað hevði við sær, at kornið og eplini, sum har vóru velt hetta summarið, vóru oyðiløgd av kúm og seyði. Tvey ár seinni var støðan lítið broytt, og tí spurdi sýslumaðurin, um hann ikki kundi fáa heimild frá amtinum til at geva sandingunum, sum ikki brúktu sín part av trøðni, tveir kostir í at velja. Annaðhvørt fóru teir sjálvir undir at velta, ella skuldu teir selja niðursetumonnunum í Skopun ella onkrum, sum ætlaði at seta seg niður har, jørðina bíliga.

Í Vágum var tvídrátturin millum traðarmenn og bøndur eisini sjónligur. Í 1831 gramdi sýslumaðurin seg serliga um, at bøndurnir vóru alt ov trekir til at vísa á nýggj øki at velta, og har lótu teir eisini kýrnar koma inn á bøin, so skjótt sum hoyggingin var liðug, men áðrenn eplini vóru tikin upp. Henda siðvenjan gekk sjálvsagt út yvir eplini. Í 1832 helt Zachariassen sýslumaður, at tað hevði eggjað til økta velting, um føroyskt korn og epli vórðu seld í handlinum ella á annan almennan hátt í Havn, tí nú vóru tey fleiri í landinum, sum veltu ella kundu velta væl meir, enn tey sjálvi høvdu brúk fyri í sínum húsarhaldi.

H.C. Müller var sýslumaður í Streymoynni. Hann boðaði í 1834 frá, at veltingin, serliga kring Havnar bý, vaks í stórum. Tað sama kundi hann siga á vári 1835, men um heystið var støðan minni góð, tí áhaldandi regn hevði verið hetta summarið, og 10. oktober vóru tey framvegis ikki farin undir at heysta korn ella taka epli upp. Hann óttaðist fyri, at støðan hjá kriatúrunum var so vánalig, at tað fór at knípa við at gøða tey komandi veturin. 11. mai 1836 staðfesti sýslumaðurin, at ein avleiðing av nógva regninum árið fyri var, at lítið varð velt upp úr nýggjum. Árið eftir var støðan líka ring, men nú var tað kavin, sum lá so leingi, at tað forðaði fyri velting. Kavi og ísur vóru eisini orsøkir til, at lítið varð velt í 1838.

Men tað var ikki bara veðrið, sum forðaði veltingini, tí longu á vári 1836 segði Müller, at vantandi set var ein onnur orsøk. Í oktober sama ár var hann

bangin fyri, at úrtøkan av veltingini fór at verða so lítil, at setepli fóru at vanta í. Í mai 1837 hevði kavin ligið leingi, og „Saa er der og stor Mangel paa Kartofler til Udsæd.“ Árið gjørdist av teimum allar vánaligastu til vøkstur, sjálvt um tað ikki var so vánaligt sum árið fyri. Várið 1838 lá kavi og ísur aftur leingi, og eisini tað árið vantaðu setepli. Müller viðmerkti, at hesin mangulin var so mikið nógv óhepnari, tí epli kundu setast niður longri inn í maimánað, sjálvt um tað tá var alt ov seint at sáa bygg. Hansara ótti vísti seg at passa væl, tí til heystar kom sera lítið burtur úr avgrøðini, og kornið var so vánaligt, at tað í fleiri støðum ikki var etandi.

Draga vit saman um hesar frágreiðingarnar frá sýslumonnum, so kunnu vit staðfesta, at epli vórðu velt um so at siga alt landið í 1830, og at tey tá í øllum førum á Sandi vóru viðurkend sum týdningarmikil fyri húsarhaldið. Samstundis sæst, at dúgliga varð velt upp úr nýggjum, annaðhvørt á innløgdum traðum ella í niðursetubygdum, og í Sandoy og Vágum legði hesin veltingarhugur trýst á siðbundnu bøndurnar. Samstundis sum nýggju veltingarøkini vóru fyritreyt fyri, at epli kundu setast niður í stórum tali, gjørdust eplini eisini avgerandi fyritreyt fyri, at til bar hjá traðarmonnum at breyðføða eitt húski.

Sandoyar sýslumaður sá, at gamla setin versnaði fyri hvørt ár, og at hon gav minni og minni ávøkst. Samstundis vóru eplini vatnutari. Tí var stórur tørvur á nýggjari set. Streymoyar sýslumaður vísti ár um ár á sama tørvin á nýggjum seteplum, men hjá honum var grundgevingin, at vantandi setepli gjørdu, at minni varð velt upp úr nýggjum. Tá ið eplini vóru vorðin lívsgrundarlag hjá nýggju og vaksandi stættini og fyritreyt fyri áhaldandi menning á somu leið, gjørdist tørvurin á nýggjum seteplum til ein samfelagstrupulleika, og tað dugdu embætismenn at síggja.

F.F. Tillisch var amtmaður frá 1830 til 1837, og hann royndi nakrar ferðir at fáa hetlendingar at senda setepli til Føroya, men tað eydnaðist honum ongantíð at fáa fatur á so stórari nøgd, at tað loysti seg at frakta tey til Føroya. Setepli uttanífrá høvdu fleiri ferðir prógvað, at tey bøttu munandi um eplagóðskuna, og áhugin var stórur fyri at fáa nýggja set. Tá fronsk og bretsk skip komu á Havnina, løgdu fólk nógv fyri í royndunum at fáa setepli frá teimum.[9]

Fútin, Christian Pløyen, hugsaði eisini um, hvat gerast kundi fyri at bøta um eplagóðskuna. Eplini vóru partur av ætlanum hansara um Hetlandsferðina frá byrjan av. Í upprunaligu umsókn síni í 1836 segði Pløyen, at „shetlandske Kartofler ere fortræffelige, medens de færøiske ere saa vandede, at man ofte maa frygte for at nyde dem.”[10] Pløyen ásannaði, at hetta var ein stórur vansi, tí eplini vóru longu vorðin týdningarmikil føði hjá vanliga føroyinginum, og tað var einasta vegetabilska føðin, um man ikki taldi drýlarnar við.[11] Longu

tá var neyvan nakað hús í Føroyum, har tey ikki ótu epli minst einaferð um dagin, og tað var torført at ímynda sær, hvussu føroyingar skuldu liva uttan tey (Pløyen 1966: 183).

## Fyrireika Hetlandsferð

Á sumri 1836 var Pløyen í Danmark. Á ferðini skrivaði hann eina umsókn um at fáa loyvi og stuðul til at gera eina kanningarferð til Hetlands. Henda umsóknin varð játtað 7. september 1836, og ætlanin var at fara avstað árið eftir. Eingin ferð varð gjørd í 1837, tí 7. juni setti Tillisch amtmaður Pløyen sum fyribilssettan amtmann í Føroyum, tí hann hevði sjálvur tikið við starvinum sum amtmaður í Ringkøbing amti.[12] Ein mánað seinni útnevndi Rentukamarið Pløyen til amtmann.

Sum amtmaður søkti Pløyen um loyvi til at brúka pening úr Økonomisk Fond til at seta ferð á arbeiðið at gera Landavegin út til torvheiðarnar í Havnardali. Tað fekk hann loyvi til, men samstundis bað Rentukamarið hann gera nakrar ætlanir fyri, hvussu peningurin í Økonomisk Fond best kundi nýtast.[13] Hetta var gylt høvi hjá Pløyen at fremja nakrar av ætlanum sínum í verki, og 10. juli 1838 svaraði hann Rentukamarinum aftur. Pløyen legði eini seks uppskot fram, og helmingurin av teimum høvdu so ella so samband við ætlaðu Hetlandsferðina. Rentukamarið tók undir við uppskotunum hjá Pløyen, og 26. september 1838 skrivaði Fríðrikur VI kongur undir eina resolutión, sum gav honum heimild at fremja tær í verki.[14] Nú hevði Pløyen bæði heimildina, sum hann fekk 7. september 1836 til at fara kanningarferðina, og heimild til at gera íløgur á ferðini.

Kostnaðarmiklasta íløgan á ferðini var at keypa setepli. Í uppskoti sínum til Rentukamarið um at keypa eina last av nýggjum seteplum, greiddi hann frá, at hann fyri at tryggja sær, at tað loysti seg at frakta eina last henda vegin, ætlaði sær at senda rundskriv kring landið, har bøndur kundu skriva seg upp fyri ta nøgd, sum teir vildu hava. Prísurin skuldi vera tríggir ríkisdálar fyri tunnuna, og vónin var, at hesin prísurin var nóg stórur til at gjalda fyri bæði epli og frakt. Skuldi tað víst seg at geva undirskot, skuldi Økonomisk Fond gjalda munin, og tað helt Pløyen sjálvur ikki var nakar trupulleiki, tí tað bar ikki til at geva hvørjum føroyingi eina betri gávu enn hesa.[15]

20. desember 1838 sendi Pløyen rundskrivið út til allar sýslumenn landsins. Í skrivinum greiddi hann frá, at hann á ferðum sínum kring landið ofta hevði hoyrt klagur um, at tað var ógjørligt at fáa góð epli, tí setin var gomul og vánalig. Tí var tað eitt breitt ynski um at fáa hendur á nýggjari set, og hon skuldi helst koma úr Hetlandi ella onkrum øðrum líknandi staði, tí royndirnar vístu, at

hesi seteplini bóru best frukt. Sýslumenninir fingu eisini at vita, at amtmaðurin hevði fingið loyvi at keypa eina last av eplum. Hann roknaði við, at eplini fóru at koma í apríl 1840, og kongur hevði játtað at gjalda tað, sum prísurin fór upp um 3 ríkisdálar fyri tunnuna. Við hesum tiltaki royndi kongur at bøta um ein stóran tørv, og Pløyen heitti á allar húsfedrar um at taka av tilboðnum, tí tað kundu ganga mong ár, áðrenn teir fingu líknandi tilboð aftur. Fyri at leggja dent á álvaran, endaði Pløyen boðini við at siga, at bara tey, sum høvdu teknað seg, fóru at fáa burtur av, tá ið seteplini komu.[16]

Frá februar til apríl 1839 komu bíleggingarlistarnir so hvørt inn til amtið frá sýslunum. Listarnir vísa, bygd fyri bygd, navnið á hvørjum einstøkum bíleggjara, og hvussu nógvar tunnur tann einstaki hevði teknað seg fyri.[17] Út frá teimum listunum er í talvunum niðanfyri gjørt eitt yvirlit yvir býtið av bíleggingum út á bygdirnar, har samanborið verður við talið á húsarhaldum sambært fólkateljingini 1840.

***Talva 1:** Yvirlit yvir talið á húsarhaldum býtt sundur í bygdir og sýslur, og hvussu nógv av teimum bíløgdu setepli. í síðsta teigi sæst, hvussu stóra nøgd av eplum, hvør bygdin bílegði.*

| | | Húsarhald ft 1840 | Tal á bíleggjarum | % húsarhald bílagt | Bílagt : tunnur skeppur |
|---|---|---|---|---|---|
| **Suðuroyar sýsla** | Hvalbiar sókn | 40 | 11 | 28 % | 14 |
| | Fámjin | 11 | 3 | 27 % | 3 |
| | Vágur | 20 | 4 | 20 % | 3 ½ |
| | Sumbiar sókn | 40 | 8 | 20 % | 7 |
| | Nes | 4 | 1 | 25 % | 1 |
| | Porkeri | 20 | 4 | 20 % | 4 |
| | Hov | 8 | 3 | 38 % | 3 |
| | Øravík | 7 | 2 | 29 % | 2 |
| | Froðba | 12 | 4 | 33 % | 4 |
| | Trongisvágur | 11 | 4 | 36 % | 5 |
| | **Tilsamans** | **173** | **44** | **25,4%** | **46 ½** |

| | | Húsarhald ft 1840 | Tal á bí-leggjarum | % húsarhald bílagt | Bílagt : tunnur skeppur |
|---|---|---|---|---|---|
| Eysturoyar sýsla | Søldarfjørður | 5 | 5 | 100 % | 1 6 |
| | Lamba | 5 | 5 | 100 % | 2 0 |
| | Glyvrar | 7 | 7 | 100 % | 1 6 |
| | Toftir | 18 | 19 | 106 % | 5 1 |
| | Nes | 5 | 1 | 20 % | 2 0 |
| | Strendur | 28 | 28 | 100 % | 10 2 |
| | Skála | 20 | 19 | 95 % | 8 0 |
| | Skálabotnur | 3 | 4 | 133 % | 0 6 |
| | Selatrað | 10 | 10 | 100 % | 2 0 |
| | Syðrugøta | 14 | 14 | 100 % | 2 7 |
| | Gøtugjógv | 2 | 2 | 100 % | 0 2 |
| | Norðragøta | 20 | 18 | 90 % | 4 0 |
| | Leirvík | 16 | 18 | 113 % | 4 5 |
| | Fuglafjørður | 22 | 23 | 105 % | 4 3 |
| | Oyndarfjørður | 15 | 15 | 100 % | 4 4 |
| | Funningsbotnur | 5 | 1 | 20 % | 2 0 |
| | Elduvík | 13 | 14 | 108 % | 3 0 |
| | Funningur | 19 | 19 | 100 % | 4 7 |
| | Gjógv | 15 | 15 | 100 % | 5 0 |
| | Eiði | 25 | 27 | 108 % | 7 4 |
| | Svínáir | 4 | 4 | 100 % | 1 0 |
| | Ljósáir | 1 | | 0 % | 0 0 |
| | Norðskála | 4 | 2 | 50 % | 0 2 |
| | Oyri | 1 | 1 | 100 % | 0 4 |
| | **Tilsamans** | **277** | **271** | **98 %** | **77 4** |

| | | Húsarhald ft 1840 | Tal á bí-leggjarum | % húsarhald bílagt | Bílagt : tunnur skeppur |
|---|---|---|---|---|---|
| **Sandoyar sýsla** | Sandur | 40 | 24 | 60 % | 9 0 |
| | Skálavík | 20 | 14 | 70 % | 2 3 |
| | Húsavík | 11 | 10 | 91 % | 3 4 |
| | Dalur | 13 | 11 | 85 % | 5 7 |
| | Skarvanes | 4 | 2 | 50 % | 0 6 |
| | Skopun | 3 | 2 | 67 % | 0 5 |
| | Skúvoy | 12 | 8 | 67 % | 2 0 |
| | Dímun | 1 | 1 | 100 % | 0 2 |
| | **Tilsamans** | **104** | **72** | **69 %** | **24 3** |
| **Vága sýsla** | Miðvágur | 41 | 33 | 80 % | 6 1 |
| | Sandavágur[18] | 25 | 19 | 76 % | 8 6 |
| | Sørvágur | 30 | 22 | 73 % | 3 1 |
| | Bøur | 4 | 4 | 100 % | 1 4 |
| | Mykines | 18 | | | |
| | Gásadalur | 10 | 11 | 110 % | 3 4 |
| | **Tilsamans** | **128** | **89** | **70 %** | **23** |

| | | Húsarhald ft 1840 | Tal á bí-leggjarum | % húsarhald bílagt | Bílagt : tunnur skeppur |
|---|---|---|---|---|---|
| **Norðoya sýsla** | Norðoyri | 5 | 5 | 100 % | 2 2 |
| | Gerðar | 3 | 2 | 62 % | 1 0 |
| | Uppsalar | 13 | 13 | 100 % | 2 1½ |
| | Vágur | 5 | 4 | 80 % | 1 0 |
| | Biskupstøð | 1 | 1 | 100 % | 0 4 |
| | Klaksvíkshandilin | 1 | | | |
| | Ánirnar | 1 | | | |
| | Árnafjørður | 5 | 5 | 100 % | 1 0 |
| | Strond | 3 | 3 | 100 % | 1 0 |
| | Skálatoftir | 3 | 3 | 100 % | 0 4 |
| | Skarð | 4 | 4 | 100 % | 0 4 |
| | Kunoy | 18 | 17 | 94 % | 2 6½ |
| | Húsar | 7 | 7 | 100 % | 2 4 |
| | Blankskáli | 6 | 6 | 100 % | 2 1 |
| | Mikladalur | 9 | 6 | 67 % | 2 3 |
| | Trøllanes | 3 | 1 | 33 % | 1 0 |
| | Viðareiði | 15 | 17 | 113 % | 8 3 |
| | Hvannasund | 4 | 4 | 100 % | 1 4 |
| | Norðtoftir, Depil | 6 | 6 | 100 % | 2 5 |
| | Múli | 4 | 4 | 100 % | 1 0 |
| | Svínoy | 12 | 13 | 108 % | 5 3 |
| | Kirkja | 10 | 7 | 70 % | 0 5 |
| | Hattarvík | 6 | | | |
| | Haraldssund | 3 | 3 | 100 % | 0 3 |
| | **Tilsamans** | **147** | **131** | **89 %** | **40 5** |

| | | Húsarhald ft 1840 | Tal á bíleggjarum | % húsarhald bílagt | Bílagt : tunnur skeppur |
|---|---|---|---|---|---|
| Streymoyar sýsla | Syðradalur | 1 | 1 | 100 % | 1 0 |
| | Norðradalur | 2 | 1 | 50 % | 0 4 |
| | Skælingur | 3 | 3 | 100 % | 1 0 |
| | Leynar | 2 | 3 | 150 % | 1 2 |
| | Stykkið | 2 | 3 | 150 % | 4 4 |
| | Kvívík | 20 | 15 | 75 % | 5 1 |
| | Vestmanna | 36 | 26 | 72 % | 9 2 |
| | Saksun | 5 | 4 | 80 % | 0 5 |
| | Tjørnuvík | 13 | 14 | 108 % | 3 4 |
| | Haldarsvík | 16 | 16 | 100 % | 7 0 |
| | Hvalvík | 13 | 10 | 77 % | 4 2 |
| | Hósvík | 6 | 5 | 83 % | 1 4½ |
| | Kollafjørður | 25 | 13 | 52 % | 6 4 |
| | Kaldbak og Sund | 10 | 9 | 90 % | 6 3 |
| | Hvítanes | 6 | 1 | 17 % | 0 1½ |
| | Hoyvík | 3 | 3 | 100 % | 1 2½ |
| | Kirkjubøur | 4 | 5 | 125 % | 2 6 |
| | Velbastaður | 8 | 9 | 113 % | 2 7 |
| | Koltur | 4 | 4 | 100 % | 2 4 |
| | Hestur | 11 | 12 | 109 % | 2 7½ |
| | Nólsoy | 20 | 22 | 110 % | 13 2 |
| | Tórshavn | 150 | 65 | 43 % | 44 0 |
| | **Tilsamans** | **360** | **244** | **68 %** | **122 2** |

Samanlagt vóru 1199 húski í fólkateljingini 1840, og 852 teknaðu seg á bílegg-ingarlistan hjá amtmanninum. Tað merkir, at meir enn 70 % av øllum skrásettum húsarhaldum í landinum teknaðu seg. Teirra millum vóru 47 einkjur og tríggjar nevndar kvinnur. Rætta talið er uttan iva nærri 100 % enn 70, tá ið havt verður í huga, at sýslumenninir ikki náddu út í hvønn krók, og at eingin tí teknaði seg í t.d. Mykinesi, og at tekningin í Suðuroy var øðrvísi, tí har savnaðust fleiri húski um hvørja tunnuna, áðrenn bílagt varð, so bíleggjararnir bara vóru 44 av tilsamans 173 húskjum. Einasti stóri munurin á húskjum og bíleggjarum, sum eftir er, var í Streymoy, og har eru tað óivað tey ognarleysu í Havn, sum ikki hava havt møguleika at seta epli niður, sum ikki eru við.

Stóra undirtøkan fyri eplaferðini hjá Pløyen vísir, at allir føroyingar vistu um ferðina, og at sera stórur áhugi var fyri at fáa nýggja set. Møguliga var undirtøkan eisini merkt av, at fólk gjørdu eftir boðunum, tá sjálvur kongur gjøgnum amtmannin kom við teimum, men tað broytir ikki tann veruleika, at Pløyen í hvussu er í hesum førinum fór til Hetlands í fólksins ørindum.

Pløyen var púra greiður um hetta, og veturin 38/39 gjørdi tað ikki minni átroðkandi at fáa fatur í nýggjari set. Í ársfrágreiðing sínari til Rentukamarið á vári 1839 segði Pløyen, at veturin hevði verið tann ringasti av teimum 9, hann hevði upplivað í Føroyum: „Det er næsten ubeskriveligt, hvor haard og i alle henseender ubehagelig den forløbne Vinter har været.“ Ringi veturin hevði ikki gjørt støðuna við eplunum betri, tí setin var sera vánalig, nú fleiri vánalig ár høvdu verið upp í slag. Í frágreiðingini skrivaði hann, at „alle imødesee med Længsel det Partie skotske kartofler... Indbyggerne have subskriberet for omtrent 350 Tønder, hvilket betydelige Quantum til et fattigt og svagt befolket Land klarligen viser, at Trangen til denne Velgjøren var stor og almindelig følt.“

Í hesum sambandi er áhugavert at síggja, at tað serliga var støðan hjá hús-monnum og fátækum, sum ørkymlaði Pløyen. Í handlinum vóru útsøluprísirnir farnir upp, men innkeypsprísurin á fiski og lýsi stóð í stað. Tað var einasta vøran, hesin samfelagsbólkurin kundi lata handlinum, so hjá teimum stóð illa til, og ringa veðrið og vánaligi gróðurin gjørdu støðuna so hættisliga, at Pløyen óttaðist fyri, at „her bliver megen Nød blandt Husmændene“. Einasta vón teirra var, at árið fór at verða gott grindaár.[19]

## Bretskir handilsmenn óttaðust einahandilin

Pløyen fór 1. juni 1839 saman við sínum trimum føroysku fylgisneytum umborð á „Hector“, sum var ein skonnart, sum sigldi fyri handilin, og eftir at hava verið í tvær vikur í Hetlandi fór Pløyen einsamallur umborð á stásiliga dampskipið „Sovereign“, sum fór úr Lerwick til Aberdeen hvønn sunnumorgun (Pløyen 1966: 57).

Hálvtannað samdøgur seinni legði skipið at í Aberdeen. Har hevði danski varakonsulin í Hetlandi, mr. Ogilvy, gjørt avtalu við múgvandi keypmannin Forbes, sum skuldi greiða Pløyen frá øllum tí, hann vildi hava at vita. Pløyen spurdi Forbes um møguleikarnar at keypa eina last av seteplum. Forbes helt í fyrstu syftu, at tað fór at verða torført at fáa eplini fyri minni enn 6 enskar skillingar fyri tunnuna, um eplini skuldu latast í Havn (Pløyen 1966: 63).

Eftir at hava kannað málið eitt sindur gjøllari, segði Forbes, at tað var eingin trupulleiki at fáa eina last, men prísurin fór ikki at verða minni enn 6 skillingar fyri tunnuna. Tá vóru allar útreiðslur av loðsi, havnargjaldi og ballast roknaðar uppí. Trupulleikin hjá Forbes var fyrst og fremst, at tær 350 tunnurnar, sum Pløyen ætlaði at keypa, var ein so lítil nøgd, at ongin tímdi at fáast við tað. Pløyen sjálvur kendi á sær, at Forbes, kanska fyri at vera blíður, fór at átaka sær uppgávuna, men tað var alt annað enn lætt hjá honum. Stóri trupulleikin var, at skipið onga vøru kundi taka heimaftur við sær. Harumframt vóru Føroyar ókend siglingarleið, og skotar hugsaðu bara, at tær máttu vera enn villari og vandamiklari enn Hetland og Orknoyggjar. Um møguleiki var fyri at koma eftir eplunum sjálvur, var eingin trupulleiki at fáa so nógv epli, sum hann vildi hava (Pløyen 1966: 66).

Í Dundee fekk Pløyen á gistingarhúsinum høvi til at práta við fleiri handilsmenn. Hann spurdi um møguleikarnar fyri at fáa eina last av seteplum, men hesir handilsmenninir vístu á sama trupulleika, sum Forbes hevði víst á. Kostnaðurin av at senda eina so lítla last so langa leið og so langt út um økið, har ein slík ferð kundi samantvinnast við aðra handilsferð, fór at verða stórur, og serliga tað, at eingin vøra kundi takast við á heimleið aftur, var ein trupulleiki fyri kostnaðin. Handilsmenninir vóru harðliga ímóti einahandlinum. Pløyen helt einki løgið vera í, at handilsmenn hugsaðu soleiðis. Á ferðini hevði hann hoyrt fleiri inniligar fordømingar av einahandlinum, og fleiri tóku synd í føroyingum, tí teir ikki kundu brúka og menna sínar kreftir (Pløyen 1966: 75).

Sama søgan endurtók seg í Leith (Pløyen 1966: 89), so tá ið Pløyen fór úr Skotlandi aftur, noyddist hann at ásanna, at einahandilin var ein meinbogi. Í øllum førum gjørdi hann tað vónleyst at fáa bretskar handilsmenn áhugaðar í at koma til Føroya við vøru, og helst ávirkaði sjónarmið teirra um, at einahandilin forðaði fyri øllum framburði, eisini hugsan Pløyens um einahandilin í Føroyum.

Pløyen var aftur í Hetlandi 7. juli. Sjálvt um upprunaliga ætlanin var at keypa epli í Hetlandi, helt hann nú, at tað var heldur ótrygt við hetlendskum eplum, tí tey ávirkaðust nógv av umstøðunum, og allar royndir at bíleggja epli úr Hetlandi vóru higartil miseydnaðar. Í Hetlandi hitti Pløyen Zachary Hamilton prest, ið var orknoyingur, og hann beyð sær til at ferðast saman við Pløyen í Orknoyggjum (Pløyen 1966: 113).

15. juli fóru Pløyen og Hamilton til Kirkwall, og har eydnaðist at gera eina avtalu við handilsmannin James Robertson. Robertson og Pløyen samráddust um eina avtalu, og teir samdust at enda um, at hann í apríl 1840 skuldi senda 350 tunnur av góðum eplum til Føroya. Robertson vildi eins og handilsmenninir í Skotlandi hava onkra vøru heimaftur við skipinum. Hann royndi fleiri ferðir at treyta sær, at hann fekk eina last av troyggjum, hosum, lýsi ella fjøður heimaftur. Pløyen hevði bara eitt svar upp á allar hesar góðu grundgevingarnar, og tað var, at slíkur handil var bannaður í Føroyum (Pløyen 1966: 126).

## Eplaskipið kom ov seint

Nú var bara at bíða til aprílmánað, men bíðitíðin gjørdist long, og fyri hvønn dag, sum gekk, ørkymlaðist Pløyen meir og meir. Allur aprílmánaður fór framvið, uttan at nakað frættist aftur frá orknoysku eplunum. Meðan bíðað varð, hendi kortini nakað annað 25. apríl, tí tann dagin kom ein hetlendsk slupp á Havnina við eini last av seteplum. Umborð vóru 128 tunnur av eplum, og eigarin hevði sjálvur tikið stig til at sigla til Føroya við vón um at sleppa at selja eplini her. Lítið mundi skipseigarin gruna, hvussu heppin hann var at koma á Havnina, júst tá ið tað sá út til, at aðrir handilsmenn høvdu snýtt amtmannin, og allar Føroyar ótolnar bíðaðu eftir teimum seteplunum, sum amtmaðurin hevði lovað teimum.

Einki bendir á, at nakar trupulleiki var av monopolinum, og tað er helst eitt tekin um, at tað var ein kroystur amtmaður, sum gjørdi skjótt av og keypti allar tær 128 tunnurnar av eplum. Eplini vórðu beinanvegin seld víðari, so at nakað kom út til hvørja sýslu, og so at okkurt var at seta niður, áðrenn ov langt varð liðið út á árið.

Út á kvøldið 16. mai legði skip inn á Sandsvág. Sandingar vóru forvitnir at frætta, hvat tað var fyri skip, sum var komið á vitjan. Skjótt frættist, at tað var eplaskipið, sum fólk høvdu bíðað so leingi eftir. Skipið var hetlendskt og æt „Lady Saltoun“. Manningin var eisini úr Hetlandi, men skiparin, Gifford Wood, var úr Stromness í Orknoyggjum. Umborð vóru 502 enskar tunnur av seteplum.

19. mai fingu sandoyingar 22 tunnur og 4 skeppur,[20] og tað var nærum tað sama, sum teir høvdu teknað seg fyri. Tá tað var gjørt, var klárt at sigla til Havnar, so skjótt sum vindurin loyvdi tí.[21] Á Skansanum skrásettu teir, at „Lady Saltoun“ kom á Havnina hálvan tíma yvir midnátt 22. mai, men amtmaðurin kom ikki aftur úr Suðuroy fyrr enn 27. mai.[22]

Müller, Streymoyar sýslumaður, sendi beinanvegin rundskriv runt í sýsluni, og tá gjørt varð upp 23. mai, høvdu fólk teknað seg til 25 tunnur og eina skeppu. Tá fólk høvdu fingið rundskrivið, svaraðu nógv, at tey høvdu keypt fleiri epli til matepli, um prísurin var lægri, men nú var liðið so langt út á árið, at tey kláraðu

ikki at seta so nógv niður, sum tey høvdu ætlað sær, tí tey høvdu longu brúkt tað mesta av tøðunum.[23]

Schrøter prestur fekk listan við teimum, sum skuldu hava epli, tí hann stóð fyri útleveringini. Í amtsjournalini sæst einki til, at hinir sýslumenninir hava svarað, men helst hevur Schrøter fingið boðini frá teimum beinleiðis, tí tilsamans 167 tunnur vórðu seldar fyri tann prísin, sum kongur gjøgnum amtmannin hevði tryggjað.[24]

Meðan sýslumenninir arbeiddu við at fáa avsett so nógv epli, sum til bar eftir gamla listanum, royndu Wood skipari og Pløyen amtmaður at finna onkra skilagóða loysn at koma burtur úr hesi truplu støðuni. Tað var lættari sagt enn gjørt, og tí endaði málið 27. mai hjá sorinskrivaranum, so hann kundi mekla millum partarnar sum notarius publicus.



*Pløyen amtmaður, Gifford Wood skipari og Hunderup sorinskrivari skrivaðu undir notarius publicus avtaluna 27. mai. Sum vitni skrivaðu Schrøter og Mikkjal Müller undir.*

Pløyen skeyt upp at selja restina av lastini á uppboðssølu, um James Robertson tók tapið, sum fór at verða av hesi søluni, men Gifford Wood skuldi taka undir við hesari fyriskipanini. Wood svaraði, at tá ið hann hevði mótmælt at taka nakað epli heimaftur við sær, kundi hann ikki gera annað enn taka undir við, at restin av lastini varð seld á uppboði, soleiðis sum Pløyen hevði skotið upp. Hann mátti tó aftur mótmæla, at hann ella reiðari hansara skuldu hava nakra sum helst ábyrgd av hesi lastini. Sostatt varð samtykt, at øll lastin skuldi á uppboðssølu, og at hvørki amtmaðurin ella skiparin vildu standa við ábyrgdini av støðuni, tí tað var Robertson, sum hevði sent ov nógv epli og sent tey alt ov seint í mun til avtaluna.

Á uppboðssøluni lá prísurin alla tíðina eitt gott petti undir teimum mettu tveimum ríkisdálunum fyri hvørja tunnu, burtursæð frá fyrstu tunnunum, sum Mikkjal Müller keypti. Samanlagt var metingin, at tær 225 ¼ tunnurnar fóru at geva 451 ríkisdálar og 3 markar, men tá talt varð upp, gav uppboðssølan 332 ríkisdálar, fimm markar og 14½ skilling.

Tá ið uppboðssølan var liðug, og myndugleikarnir vóru leysir av eplatunnunum, kundi Davidsen amtskontoristur gera støðuna upp. Hann roknaði í donskum tunnum, og tá vóru tær 502 ensku tunnurnar umroknaðar til 431 danskar. Av teimum vóru 17 spiltar, og so vóru 414 eftir. Føroyingar keyptu 167 tunnur fyri avtalaða prísin, og nú vóru 247 eftir. Tá uppboðssølan skuldi fyrireikast, vísti tað seg, at allar tunnurnar vóru ikki heilt fullar. Tilsamans 21 ¾ tunna var drigin frá sum undirmál, og so vóru 225 ¼ tunnur eftir. Útreiðslurnar av at halda uppboðssøluna vóru 30 ríkisdálar og 13½ skillingar.[25]

## Nýggjur veltingarháttur

Umframt at fáa fatur á sjálvum seteplunum, snúði ferðin hjá Pløyen seg eisini um at kunna seg við nýggjar og betri veltingarhættir. Tá ið seteplini vóru keypt, var eftir at seta seg inn í, hvussu frægast var at velta tey. Sambært Pløyen brúktu føroyingar ofta vánaligasta jarðarteigin til epli og taðaðu hann við nógvum tara. Síðani settu teir eplini niður og løgdu seiga svørðin omaná. Pløyen hevði sæð, at spírur kundu berja seg upp gjøgnum ein bøkk, sum var so samanbundin av grasrótum, at hann illa nokk hevði megnað at skrætt hann sundur við hondunum. Úrslitið varð eisini, at eplini vórðu vatnut og bleik, skrumpað og rukkað, og Pløyen helt tey vera líka so ósunn, sum tey vóru ljót og smakkaðu illa (Pløyen 1966: 183–184).

Heimafturkomin úr Hetlandi skrivaði hann Rentukamaranum eina frágreiðing, har hann segði, at ferðin hevði víst honum, at landbúnaðurin væl kundi bøtast, uttan at orsøk var til at innflyta dýr og í Føroyum ókend amboð. Meðan føroyingar høvdu tann óvana at velja sær vánaligasta pettið í nýinnlagdari jørð at velta epli í, valdu bøndur í Hetlandi bestu jørðina til eplini, og tann moldin var væl velt, leys í tí og púra frí fyri klumpar og steinar. Síðani settu teir eplini niður í beinar rekkjur og hyppaðu tær gjølliga. Tað gjørdi, at teir næstan altíð fingu góða avgrøði, sum altíð var etandi. Í Hetlandi laðaðu teir sterkar og manshøgar garðar at verja velturnar, men sjálvandi var tað nógv lættari hjá teimum at fáa fatur á steini at laða við, tí har var grovur sandsteinur vanligasta steinslagið.[26]

Í bók síni um Hetlandsferðina kom hann fram til, at ráðini í Føroyum vóru at blanda sand og øsku í mosakendu jørðina. Hetta arbeiðið fór at loysa seg í longdini. Tá jørðin so var velt, so eingir klumpar, steinar og ókrút vóru í henni, var at saksa hana og leggja seteplini í beinar linjur við umleið 1½ fóti millum hvørja rekkju. Eplini skuldu leggjast við einum fóti ímillum, og veltan skuldi lúkast væl og virðiliga. Tá ið slokkarnir vóru 3 til 4 tummar høgir, skuldi veltan hyppast, tí tað fjaldi rótina betur og vardi ungu spírarnar móti stormi og kulda. Harumframt helt tað vatninum burtur, og júst vatnið var størsti vansin í eplaveltingini.

Sambært Pløyen hyppaðu føroyingar als ikki velturnar tá í tíðini (Pløyen 1966: 184). Tað gjørdu teir heldur ikki í 1800, tá ið Jørgen Landt skrivaði kendu bók sína *Forsøg Til En Beskrivelse over Færøerne*. Hann helt, at ein forðing fyri, at føroyingar fóru at velta fleiri epli var, at tey køvdu grasið, sum hvarv í fleiri ár, har velturnar vóru. Við 7 ára royndum helt Landt, at orsøkin til tess var, at føroyingar koyrdu mold út yvir alla veltuna. Hann hevði sjálvur roynt at sett eplini niður í beinar linjur og hyppað ímillum tey, og tá kom grasið so væl fyri seg ímillum reglurnar, at hann noyddist at lúka. Árið eftir vaks grasið javnan betur, har epli høvdu verið velt, enn har korn hevði verið velt (Landt 1965: 311).

Alt bendir á, at lítið var broytt í veltingarháttinum frá 1800 fram til 1840, men eyðsýndu fyrimunirnir við hyppuveltu gjørdu, at Pløyen vónaði, at føroyingar fóru at taka hesi ráðini til sín. Hinvegin visti hann eisini av royndum, at nógv fóru at vera ímóti hesum ábótunum, tí soleiðis høvdu forfedrarnir ongantíð gjørt. Hann helt seg vita, at nógv fóru at flenna at hansara ráðum og at teimum, sum fóru at fylgja ráðunum. Hansara niðurstøða um hesa mótstøðu var:

> Det har i ethvert Land kostet Kamp og krævet Tid, at faae indført just den Plante, som jeg her sidst har omhandlet, Kartoflen, fordi det var et nyt, et usædvanligt Fødemiddel; saaledes har Almuen stedse været, saaledes vil den fremdeles blive, og Færingerne ere i denne Henseende ikke anderledes end alle andre Folkefærd (Pløyen 1966: 185).

Eitt annað, sum Pløyen legði merki til í Hetlandi var, at teir turkaðu fuktiga jørð við at grava veitir, sum teir síðani fyltu grót niður í. Hetlendingar nevndu hetta drains, og drening átti at verið hyggjuráð hjá føroyingum at tikið til sín. Føroyingar áttu serliga at arbeitt jørðina meira, heldur enn at draga gróðurin fram úr vátu jørðini við at nýta alt ov nógv tøð. Í fyrstu frágreiðingini til Rentukamarið boðaði Pløyen frá, at hann ætlaði at fáa boðskapin um nýggju veltingarhættirnar út til føroyingar. Trupulleikin var bara, at eingin miðil var at breiða slíkan boðskap út við. Sjálvur helt Pløyen, at einasti møguleikin var at fáa prestarnar at hjálpa sær við tí.[27]

## Eplini geva nógv fold

Eitt var, at eplini komu væl seinni enn ætlað, men veðrið var heldur ikki til vildar í 1840. 12. juni fekk Rentukamarið at vita, at veðrið hevði verið óvanliga hart og við stormi av høgætt og eysturætt. Á fjøllunum var kavi, og amtmaðurin óttaðist fyri, at veðrið fór at skaða tað korn og tey epli, sum vóru sett niður.[28]

Hesin óttin vísti seg at halda, tí tá ið sýslumenninir komu við sínum frágreið-

ingum, vóru tær flestu dapur lesnaður. Vága sýslumaður boðaði 30. september 1840 frá, at ein stórur partur av hetlendsku eplunum ikki spíraðu, og sum hann hevði skilt á lagnum, so væntaðu menn ikki at fáa meir uppaftur, enn teir høvdu sett niður.

H.C. Müller, Streymoyar sýslumaður hevði verið ógvuliga spentur upp á nýggju seteplini. Um mánaðarskiftið mars/apríl skrivaði hann, at nú var so væl velt sum nakrantíð fyrr, og tað komst av, at vónirnar vóru so góðar í ár, nú ov mikið av seteplum fóru at vera at fáa. Men 6. oktober noyddist hann vónbrotin at boða frá, at „*Korn og Kartoffelhøsten er af de allersletteste man kan erindre, og endskjøndt lidet deraf endnu er indhøstet, saa kan man med temmelig Vished forudsige, efter almindelig Mands Beretning, at Kornet ikke bliver Menneskeføde, og af Kartofler ville de fleste ikke faae stort mere end Udsæden tilbage*."

Støðan líktist í Eysturoy og Norðoyggjum, har sýslumaðurin helt, at orsøkin var, at summarið hevði verið vátt og fyrri partur av summarinum kaldur. Um veðrið hevði verið øðrvísi í Sandoy, ella orsøkin var, at eplaskipið kom har fyrst, ber ikki til at staðfesta, men í Sandoynni roknaði sýslumaðurin 30. september við, at eplaskurðurin fór at verða góður. Í Suðuroynni roknaðu teir við einum miðalári.

Fyrsta árið var sostatt eitt vónbrot, men í 1841 gekst betur. Streymoyar sýslumaður greiddi frá, at kornið fór at verða gott, men lítið, tí óvanliga turra summarið hevði steðgað vøkstrinum í langa tíð, og út á heystið hevði veðrið verið vánaligt. Eplini sóu hinvegin út til at fara at verða góð, bæði í nøgd og góðsku. Aðrastaðni frættist um miðalár til epli. Í Sandoy vóru eplini sera góð, men í Norðoyggjum segði sýslumaðurin, at eplavøksturin allastaðni hevði verið av tí vánaligasta, og serliga setin úr Orknoyggjum var vánalig, tí meginparturin av henni bar als onga frukt.

Tá ið Pløyen tók saman um árið í frágreiðing síni til Rentukamarið, segði hann, at „*Kornavlen overalt kun ubetydelig i Mængde og derhos meget ulige af Godhed, Kartoflerne derimod have afgivet en middelhøst og ere meget gode. Det er mig en særdeles Behagelighed, at kunne ærbødigst tilføie, at den fra Orknøerne og Shetland, ved det høie Collegie naadige Tilladelse og Understøttelse, indførte Kartoffelsæd i Aar, – det 2det Aar, den har været saaet her paa Øerne – nu viser sig at svare godt til Hensigten, og har bidraget væsentligt til at forbedre Kartoflernes Qualitet.*"[29]

Sostatt helt Pløyen, at endamálið við at keypa eina last av seteplum var nátt í 1841, og í 1842 mundu tey flestu vera samd við honum, tí tað árið tók Streymoyar sýslumaður saman um árið við at siga, at korn og epli vóru so góð, sum tey ongantíð høvdu verið fyrr. Einasti vansin var, at nakað lítið var sáað og sett niður, tí mongu vánaligu árini undan høvdu gjørt, at menn mistu mótið, og so

hevði nógvur fiskur verið at fingið í veltingartíðini. Í Vágum var eplagróðurin eisini góður hjá teimum flestu, og tey eplini, sum amtmaðurin hevði fingið fatur á, vóru framúr góð. Í Eysturoynni góvu eplini 8 fold, og tað varð roknað sum eitt gott ár, í Suðuroy lýsti sýslumaðurin eplagróðurin sum góðan, og eisini í Norðoyggjum roknaði sýslumaðurin við, at tað fór at verða eitt gott eplaár.

## Hyppiveltan gerst vanlig

Nýggju seteplini hjá amtmanninum fingu høvuðsæruna av góðu gongdini, sum nú var komin í eplaveltingina, men veðrið hevði sjálvandi sítt at siga. Spurningurin er eisini, hvussu stóra ávirkan nýggja vitanin um eplavelting hevði. Einasti sýslumaðurin, sum umrøddi sjálva veltingina, var Sandoyar sýslumaður M.A. Winther. Hann segði um árið 1842, at eplini vóru heilt góð, og at serliga á Sandi veltu tey væl fleiri epli, enn tey høvdu gjørt undanfarin ár, og hann legði afturat, at tað var merkisvert, hvussu nógv eplini, sum vóru komin úr Orknoyggjunum, góvu av sær. Á Sandi vóru tey nú farin at velta soleiðis, at tey bara skuldu brúka ein triðing ella ein fjórðing av teimum tøðunum, sum tey høvdu nýtt áður. Einki stendur um, hvat slag av veltu, talan var um, men lítil ivi man vera um, at sandingar tá vóru farnir undir at hyppa.

Nýggi hátturin at velta epli mundi hava sínar dygdir, tí hann gjørdist við tíðini vanligur kring alt landið, men tað tók langa tíð. So seint sum í 1886 greiddi Rasmus Effersøe frá, at eplini fyrr vóru velt á sama hátt sum kornið, men nú var man farin undir at grava djypri niður, og hypping var vanlig í flestu støðum. Ein orsøk til, at tað tók so langa tíð at broyta vana, var, at eplini fóru illa við grasinum á gamla bønum, tí grasfræ varð ikki sátt. Tí skuldu gerði, viðurbyrgi og traðir leggjast inn at velta epli í, og tað var drúgt arbeiði. Umframt hesa nýløgdu jørðina segði Rasmus, at mold við nógvum sandi eisini var góð til eplavelting, tí har vaks gras ikki so væl kortini (Effersøe 1886: 17).

## Eplasjúka førdi til endurtøku av royndunum frá 1839

Komandi árini vóru góð eplaár. Væleydnaðu royndirnar við orknoysku eplunum frættust í Hetlandi, og í 1843 komu í hvussu er trý skip at selja setepli. Tað fingu tey loyvi til at gera, um tey seldu afturfyri kontantar pengar. Skipini fingu ikki loyvi til at taka føroyska vøru við sær aftur úr Føroyum.[30]

Í 1845 gjørdi eplasjúka um seg í Írlandi við vanlukkuligum avleiðingum. Eplini vóru einasta lívsgrundarlagið hjá milliónum av fólki, og tá tey nú hvurvu av sjúku, var grundarlagið skrykt undan hesum nýggju samfelagsstættum. Eplasjúkan merktist eisini í Føroyum, í fyrstu syftu tá prísurin á nýggjum seteplum vaks so nógv, at tey vóru mestsum ikki keypandi, men út á heystið 1846 fóru keðilig

tíðindi at frættast í Føroyum. Sjúka var komin í eplini, og 23. september 1846 kunngjørdi Regenburg, landslækni, at neyðugt var at taka stig til at berja sjúkuna niðuraftur.[31]

Pløyen tók beinanvegin sjúkuna í álvara, og longu tíðliga í oktober hevði hann avgjørt, at tørvur var á at bíleggja setepli. Eplasjúkan var so vanlig í Skotlandi í 1846, at hyggjuráðini vóru hesa ferð at royna at fáa eina last av seteplum úr Danmark. Eplasjúkan og avleiðingarnar av henni verða ikki nærri viðgjørdar í hesi greinini, men áhugavert er at síggja, at Pløyen í 1846 gjørdi á júst sama hátt sum í 1839. Hann sendi boð til sýslumenninar um at fáa fólk at tekna seg fyri ávísari mongd, og síðst í marsmánaði var enn eitt eplaskip á veg til Føroya. Hesa ferð eydnaðist tað betur við at fáa býtt eplini út eftir bíleggingunum, og miðjan apríl 1847 fingu sýslumenninir boð um at krevja peningin inn, tá ið teir næstu ferð fóru rundferð í sýslum sínum. Prísurin var 4 ríkisdálar, ein mark og 8 skillingar fyri tunnuna.[32]

## Kollvelting og eplavelting

Pløyen visti bæði frá sínum egnu ferðum kring landið og frá árligu frágreiðingunum frá sýslumonnunum, at tørvurin á nýggjari set var stórur. Í hvussu er í Streymoy boðaði sýslumaðurin frá, at áhugin at velta upp úr nýggjum fall, so hvørt sum úrtøkan av eplaveltingini versnaði. Tað var hesin hugurin at velta upp úr nýggjum, sum var grundarlagið undir nýggju traðarmannastættini ella húsmannastættini, sum hon verður nevnd í almennu keldunum, og tað var serliga úr hesum bólki, at økta fólkatalið og nýhugsan skuldi spretta. Á gamla bønum hildu bøndurnir í høvuðsheitum fram at reka garðar sínar á sama siðbundna hátt, sum teir høvdu gjørt í øldir. Sjálvt um broytingar við tíðini eisini hendu á bóndagørðunum, og teir eisini fóru at velta epli, kundi ikki roknast við, at hesar broytingar fóru at kollvelta nakað samfelag.

Nýggju veltingarøkini vóru fyritreyt fyri, at epli kundu setast niður í stórum tali, og samstundis gjørdust eplini eisini avgerandi fyritreyt fyri, at til bar hjá traðarmonnum at breðføða eitt húski. Tá ið eplini vóru vorðin lívsgrundarlag hjá hesi nýggju og vaksandi stættini, vóru tey eisini fyritreyt fyri áhaldandi menning á somu leið, og tí gjørdist tørvurin á nýggjum seteplum til ein samfelagstrupulleika. Tað dugdi Pløyen at síggja.

Aðrastaðni gjørdist eplavelting ein av týdningarmiklu tættunum, sum vóru grundarlag undir ídnaðarkollveltingini. So framskygdur var Pløyen neyvan, men umframt at keypa epli var annað endamál við Hetlandsferðini at seta seg inn í fiskivinnuna har, og stóran part av tíðini í Skotlandi leitaði Pløyen eftir einari mekaniskari torvpressu, sum hann vónaði kundi minka um ta øgiligu arbeiðsorku,

føroyingar løgdu í torvarbeiðið. Um somu tíð hevði hann eisini ætlanir um at fáa til vega eina lýsipressu, sum kundi fáa meira lýsi burtur úr spikinum. Hetta var alt liður í vónini um at kunna seta gongd á eina mekanisering í Føroyum,[33] so tankin um, at hann hevur hugsað um eplini sum part av kollveltingini av føroyska samfelagnum, er ikki langt burturi.

Størsta forðingin fyri framburðinum var siðvenjan, ella „gammel Skik", sum sæst aftur og aftur í keldutilfarinum, tá ið menning og framburður á ymsum økjum var til umrøðu. Aftanfyri hesa gomlu siðvenjuna liggur bóndasamfelagið, sum gjøgnum fleiri hundrað ár hevði ment lógir, reglur og aðrar skipanir og siðvenjur, sum vóru ideellar til eitt statiskt samfelag upp á eini 4-5000 fólk. Skuldi samfelagið mennast, skuldu hesar siðvenjur broytast, og tað var ikki bara at siga tað. Nýggja traðamannastættin var ikki so bundin at gomlu siðvenjunum, tí traðirnar vóru „et nyt strukturelt element blandt de traditionelle marktalsbrug", sum Karsten Sedal lýsti tað (Sedal 1983: 48). Siðvenjurnar vóru javnan størsti meinbogin hjá traðarmanninum, sum tað t.d. sæst í frágreiðingunum hjá Vága sýslumanni, sum boðaði frá, at bøndur lótu kríatúr sleppa í velturnar. Tí ber helst til at siga, at nýggja stættin og framburðssinnaðir embætismenn høvdu somu áhugamál.

Pløyen var ógvuliga tilvitaður um nýggju stættina, og bæði hóttanin um, at fólk fóru at halda uppat at velta upp úr nýggjum, og óttin fyri, at hungursneyð fór at raka traðarmenninar, vóru týdningarmiklar grundgevingar fyri at gera nakað serstakt fyri at fáa fatur í nýggjari set. Á listunum yvir bíløgd epli sæst, at so at siga øll húsarhald vildu hava sín part, og tað er prógv um, at eisini siðvandu bøndurnir tóku eplini til sín, men upp á seg hevði eplaveltingin sjálvsagt størri týdning hjá teimum, sum lítið og einki annað høvdu at líta á. At óttin fyri hungursneyð var veruligur, er hungursneyðin í Írlandi og Skotlandi fá ár seinni greitt prógv um. Hon vísti, hvussu stóran týdning eplavelting hevði fyri stætt av líknandi slag sum traðarmenninir. Eplasjúka oyðilegði gróðurin, og so var alt lívsgrundarlagið horvið (Salaman 1985: 289ff).

Krúnan á siðbundna bóndasamfelagnum var kongligi handilin, sum hóskaði væl til statiska samfelagið, men als ikki megnaði at flyta seg so skjótt, sum eitt samfelag í broyting kravdi. Tað fyrsta, sum sæst um, hvørjar hugsanir Pløyen hevði um einahandilin, er eitt álit, sum hann sendi Tillisch amtmanni 29. september 1835. Pløyen byrjaði álitið við at siga: „*Den Tanke, at et Monopol er en unaturlig og trykkende Institution, maa, ligesom af sig selv, paatrænge sig Enhver, der kommer fra Danmark til Færøerne, og, indtil man nøiere lærer at kjende Monopolets Indflydelse paa Land og Folk, dito gavnlige og skadelige*

*Virkninger, udtaler man radikale Fordømmelsesdomme over denne Indskrækning i en af Menneskenes naturligste Friheder.*" Trúgvin upp á hetta natúrliga frælsið viknaði kortini, tá ið embætismaðurin kom til Føroya, tí sjálvt um fríhandil helst fór at gera onkran ríkari, so fór hann púrasta at „tillintetgjøre de fattige." Í hesum sambandinum verða tey fátæku roknað sum tey, sum liva av at virka ullina hjá bóndunum afturfyri triðing, og traðarmenn verða als ikki nevndir.[34]

Fýra ár seinni var Pløyen, sum tá var amtmaður, ørkymlaður av, at handilin gjørdi støðuna hjá húsmonnum og fátækum torførari. Útsøluprísirnir fóru áhaldandi upp, men innkeypsprísurin á fiski og lýsi stóð í stað, og tí versnaði keypiorkan hjá teimum, sum bara høvdu fisk og lýsi at selja. Ullarprísurin hækkaði saman við útsøluprísinum, so fyri tey, sum áttu ull, var eingin munur. Á henda hátt var einahandilin við til at styrkja siðbundna samfelagið, og handilin trýsti eisini saman við versnandi gróðuri og eplagóðsku traðarmannastættina heilt út á eggina móti hungursneyð.

Í 1839 bendi ikki nógv á, at Pløyen framvegis hugsaði um einahandilin sum eina trygd hjá teimum fátæku. Sjálvt um Pløyen broytti hugsan um einahandilin, tá ið hann kom til Føroya, so vóru frælsishugsanirnar framvegis høgt í metum úti í heimi, og tað kundi Pløyen ásanna sama ár, tá ið hann fór til Skotlands. Hann keypti dýran klædning og annað fyri at tryggja sær, at hann kundi bera seg millum bretsku gentlemenninar, men tað var alt til fánýtis, tí tá hann á salongum royndi at fáa onkran handilsmann at føra eina last av seteplum til Føroya, vildu handilsmenn einki hava við hann at gera, tá ið teir hoyrdu um einahandilin og forboðið móti at taka vørur út úr landinum aftur. Úrslitið var, at Pløyen noyddist heilt til Orknoyggjar fyri at fáa blíðar menn at hjálpa sær. Møguliga gjørdi Robertson avtaluna við Pløyen meir av vælvild enn av brennandi handilsligum áhuga, og hugsandi er, at tað var orsøk til, at so long tíð gekk, áðrenn eplaskipið kom fram.

Hetlandstúrurin og royndirnar at keypa epli fingu Pløyen at ásanna, at einahandilin var stór forðing fyri framburði í Føroyum, og at natúrliga handilsfrælsið, sum hann kendi so væl, áðrenn hann kom til Føroya, var vegurin fram. Pløyen endaði bók sína um Hetlandsferðina við orðunum: „*Jeg troer slutteligen at turde, med god Samvittighed, sige, at jeg, efter mine Evner, ærligen har arbeidet i de mig anviste Retninger, og jeg skal alene endnu henvende mine Medborgeres Opmærksomhed paa, at Man, foruden de Hindringer, som locale Forholde og Vedhængen ved det Gamle allesteder lægge iveien for Forbedringer, her har at kæmpe imod et, al Industri hæmmende, al Fortjeneste absorberende Monopol.*" (Pløyen 1966: 186). Hesar hugsanir hevði hann helst við sær, tá ið hann fór til Keypmannahavnar 18. juni 1840 við skonnartini „Havfruen",[35] bara 9 dagar eftir

uppsøluna av orknoyaeplunum. Ørindini vóru at taka lut í nevnd, sum hevði til endamáls at finna fram til, hvussu einahandilin kundi avtakast.

Í 1840 sást ikki nógv til nakað gagn av eplunum, men árini eftir vístu nýggju seteplini seg at roynast væl, og vøkstur kom aftur í eplaveltingina. Góða úrslitið frættist, og í 1843 komu fleiri hetlendsk skip av egnum ávum henda vegin at selja setepli. Tað var brot á einkarættin hjá einahandlinum at flyta inn vøru, men einahandilin gav sjálvur loyvi til, at eplini kundu seljast í Havn fyri kontantar pengar.[36] Tá ið eftirspurningurin í Havn var nøktaður, var Pløyen skjótur at geva næsta skipinum loyvi at fara aðrastaðni í landinum at selja, tí tað var landi og fólki at frama, og tað hevði størri týdning enn at fylgja reglunum og tryggja einahandlinum einkarætt sín.[37]

Tað er tekin um, at rættindini hjá einahandlinum ikki longur vóru so ultimativ. Áðrenn fríhandilin kom, bar til at seta hol á einahandilsmúrin, tá landsins frami kravdi tað, og tað er søgan um eplini úr Orknoyggjum gott dømi um. Tá ið eplasjúka hótti í 1846, var Pløyen skjótur at skipa fyri nýggjum seteplakeypi á sama hátt sum í 1839. Ein slík endurtøka ger, at lítið er at ivast í, at Pløyen roknaði eplakeypið í 1839 sum eina sólskinssøgu, og skjóti atburðurin tá er eisini prógv um, at hann ikki ivaðist í, hvussu stóran týdning eplini høvdu fingið í Føroyum.

## Samanumtøka

Altjóða gransking er komin fram til, at umleið ein fjórðingur av vøkstrinum í fólkatalinum í tíðarskeiðinum 1750-1850 stavar frá øktari eplavelting, og at hesin vøkstur var serliga stórur, tá samanfall var millum nýtsluna av mjólk og eplum. Í Føroyum var mjólkin týdningarmiklasta føðikelda, tá ið eplini gjørdust vanlig, so her skuldi økt eplavelting ført til minst líka stóran fólkavøkstur sum aðrastaðni. Tað var eisini um somu tíð, sum eplini gjørdust vanlig, at áhaldandi vøkstur kom í fólkatalið í Føroyum. Eplini vóru ikki væl sædd á gamla bønum, so nýggjar innleggingar og niðursetubygdir skuldu til, og tey gjørdust skjótt grundarlag undir nýggjari stætt, sum ikki var so bundin í siðvanda bóndasamfelagnum, og sum hevði bæði tíð til og tørv á øðrum arbeiði afturat arbeiðinum á trøðni. Tað var við til at seta gongd á útróður sum sjálvstøðugan vinnuveg í Føroyum, og seinni merkti tað, at menn vóru klárir at manna sluppirnar, tá fiskivinnan byrjaði av álvara. Á henda hátt høvdu eplini avgerandi ávirkan á menningina av føroyska samfelagnum, men tað er ikki lætt at svara spurninginum um, hvussu stór henda ávirkanin var. Skal tað gerast, mugu neyvari kanningar gerast av týdninginum av øðrum føðikeldum, færri umfarsjúkum o.ø.

Embætismenn fegnaðust um framgongdina, og teir fylgdu væl við gongdini kring landið. Gjøgnum meginpartin av 1830-árunum gjørdu vánaligt veður og

versnandi seteplagóðska, at fólk so smátt fóru burtur frá eplaveltingini aftur, og áhugin at velta upp úr nýggjum fall. Samstundis gjørdi vánaliga úrtøkan eisini, at hungursneyð hótti nýggju traðarmannastættina. Fyri embætismannin í samtíðini var tað helst hóttandi neyðin, sum lá fremst í huga, tá ið tiltøk sum eplakeypið í 1839 skuldu fremjast, men hann visti eisini, at nýggjar stættir vóru hansara bestu stuðlar til at gera tær broytingar, sum skuldu kollvelta føroyska samfelagið og fáa tað burtur frá at byggja á „gammel Skik." Tí varð eplakeypið knýtt saman við fleiri aðrar tættir, sum allir høvdu til felags at nútímansgera føroyska samfelagið, og tí ber helst til at siga, at eplakeypið var liður í teimum hugsanum um modernisering, sum Pløyen og aðrir arbeiddu við hesi árini. Tað var í hvussu ein tilvitað roynd at forða fyri, at steðgur kom í arbeiðið at velta upp úr nýggjum, og sum slíkt gjørdist væleydnaða eplakeypið í Orknoyggjum týðandi liður í at halda gongd í framburðinum.

**Bókmentalisti:**


Andersen, N. 1964. Færøerne 1600-1709. 2nd edn. Torshavn: Helge Justinussens Bókahandil

Bjørk, E.A. 1984. Færøsk Bygderet, 2den Del: Ejendomsforhold Og Udskiftning. 2. útgáva. ed. by Bloch, D., Clementsen, Ó., and Danielsen, Ó. Tórshavn: Matrikulstovan

Cook, C.J. 2013. MPRA_paper_51885.pdf [online] available from <http://mpra.ub.uni-muenchen.de/51885/1/MPRA_paper_51885.pdf> [16 April 2014]

Debes, H.J. 2000. Føroya Søga III. Frá kongaligum einahandli til embætisveldi. Tórshavn: Føroya skúlabókagrunnur

Debes, H.M. 1977. Søgur Úr Gomlum Døgum. Tórsh.: Stabbin

Effersøe, R.C. 1886. Landbruget og Husdyrbruget paa Færøerne samt Midler til Husdyrbrugets Fremme, Udarbejdet paa Det Kongelige Danske Landhusholdningsselskabs Opfordring. Keypmannahavn

Guttesen, R. 2005. „Týskar klumpar og franska sós". In Eyðvinur. 1st edn. ed. by Marnersdóttir, M., Cramer, J., and Johansen, A. Tórshavn: Føroya Fróðskaparfelag, 153–164

Guttesen, R. 2010. Veðurlag, framleiðsla og fólkatal í 1800-talinum og fyrr. In Brot Úr Føroya Søgu. ed. by Nolsøe, L. Tórshavn: Fróðskapur, 43 – 65

Guttesen, R. (n.d.) Sendingsgods fra Færøerne 1805-1855. Fróðskaparrit 61

Haraldsen, H. 1985. Hugrák : Slektsøga 1700-1900. Tórshavn: s.n.

Landt, J. 1965. Forsøg til en Beskrivelse over Færøerne. Tórshavn: Einars Prent og Forlag

Nielsen, C.F. 1888. Færøernes verdslige Stat efter Reformationen. s.n.
Nolsøe, J.P.A. and Jespersen, K. 2009a. Havnar Søga 3. Tórshavn: Tórshavnar kommuna
Nolsøe, J.P.A. and Jespersen, K. 2009b. Havnar Søga 4. Tórshavn: Tórshavnar kommuna
Nunn, N. and Qian, N. 2011. The Potato's Contribution to Population and Urbanization: Evidence From A Historical Experiment. The Quarterly Journal of Economics [online] 126 (2 ), 593–650. available from <http://qje.oxfordjournals.org/content/126/2/593.abstract>
Pløyen, C. 1966. Erindringer fra en Reise til Shetlandsøerne, Ørkenøerne og Skotland i Sommeren 1839. 2nd edn. *Tórshavn: Einars Prent*
Salaman, R.N. 1985. The History and Social Influence of the Potato [online] 2nd edn. ed. by Hawkes, J.G. Cambridge University Press. available from <http://www.amazon.com/History-Social-Influence-Potato/dp/0521316235/ref=sr_1_1?s=books&ie=UTF8&qid=1396394108&sr=11&keywords=salman+potatoes> [4 April 2014]
Schrøter, J.H. 1836. Samling af Kongl. Anordninger og andre Documenter, Færøerne vedkommende, tilligemed en Afhandling. Keypmannahavn
Sedal, Karsten 1983. Færøske trøbrugere. En etnologisk undersøgelse af trøbrugernes eksistensvilkår og dagligiv ca. 1770-1970. Magisterafhandling i europæisk etnologi. Institut for europæisk folkelivsforskning. Københavns Universitet. Maj 1983.
Sejersted, F. 1978. Norges Historie. Bind 10. Den Vanskelige Frihet 1814-1851. ed. by Mykland, K. Oslo: J.W. Cappelens Forlag

## Óprentaðar heimildir:

## Føroya Landsskjalasavn:

Amtssavnið:
Innkomin brøv, Litra L
Innkomin brøv, Litra M
Innkomin brøv, Litra N
Journal, Litra N
Kopibók, Litra R
Kopibók, Litra S
Kopibók, Litra T
Kopibók, Litra U
Skansaprotokol 1785-89
Skansaprotokol 1838-43

Skansaprotokol 1843-46

*Fútasavnið:*
Kopibók 1830-1837
*Sorinskrivarin:*
Auktionsprotokol 1837-44
Notarialprotokol 1832-46

*Suðuroyar sýsla:*
Diverse sager, Litra F, Landbrugsforsøg

*Privat savn:*
Dagbókin hjá C.M. Olsen

**Føroya Landsbókasavn:**
Dagbókin hjá Claus Lund

## Notur:

1 Henda greinin er partur av verkætlanini „Det færøske samfunds transformation. Et helhedsperspektiv på de sociale og økonomiske kræfter, der skabte det moderne Færøerne", sum verður gjørd saman við Hans Andriasi Sølvará, lektara í søgu, Gesti Hovgaard, lektara í samfelagsfrøði og Rolf Guttesen, lektara í geografi. Teir eiga stóra tøkk fyri góð faklig ráð. Mirjam Joensen, granskingarhjálpari í verkætlanini, skal eisini hava eina stóra tøkk fyri hennara stórarbeiði at finna fram keldur og týða mangan knortlutu handskrift Pløyens. Eg fari eisini at takka peer-reviewaranum fyri konstruktivar og tiltrongdar viðmerkingar, sum hava gjørt greinina væl betri, enn hon annars hevði verið.

2 Í bók síni *Samling Af Kongl. Anordninger Og Andre Documenter, Færøerne Vedkommende, Tilligemed En Afhandling* vísir Schrøter til eitt svar, sum pápi hansara skrivaði til eitt uppskot um at stovna Økonomisk selskab. Svarið var so langt, at pláss var ikki fyri at endurgeva tað í bókini, men tað er staðfesting av, at Christian Schrøter sjálvur skrivaði um hesa royndina at innføra epli í Føroyum. Schrøter nevnir einki árstal, men C.F. Nielsen refererar somu søgu í síni bók (**Nielsen 1888: 182**), og har leggur hann afturat, at skrivið hjá eldra Schrøter var dagfest 4. september 1764. Tí verður 1758 fyrsta árið, vit við rættiliga stórari vissu kunnu siga, at epli vóru velt í Føroyum.

3 Guttesen 2005 og Bjørk 1957/58 hava skrivað meira um fyrstu ábendingarnar um eplavelting í Føroyum.

4 Færø Amt Skansaprotokol 1785 22/9-1789 28/2. Í protokollini stendur „Jordæbler".

5 Dagbókin hjá Claus Lund. 26. juni 1814.

6 Rolf Guttesen hevur skrivað áhugaverda grein um listarnar yvir tað sendingsgóðs, sum varð sent til Danmarkar (Guttesen n.d.). Tíverri er ikki komið fram á líknandi listar yvir sendingsgóðs, sum varð sent til Føroya.

7 Í tekstinum stendur, at eplið kom til Gjáar í 1835. Tað er ikki rætt, tí tá ið Eysturoyar sýslumaður í 1830 skrivaði frágreiðing um støðuna í oynni, varð nevnt, at epla- og korngróðurin við Gjógv var vánaligur tað árið.

8 Tá onnur kelda ikki er viðmerkt í hesum partinum, stava upplýsingarnar frá sera áhugaverdu frágreiðingunum frá sýslumonnunum, sum eru savnaðar saman í Guttesen, Rolf (edit.) (2010): Indberetninger fra Sysselmanden i Henhold til Amtsordre af 23. november 1830, ver. 4.1. Internet 10. juli 2014. www.history.fo. Av tí, at noturnar høvdu blivið so nógvar, verða hesar tilvísingar koyrdar í hesa heildarnotuna.

9 Færø Amt Kopibók, Litra R, nr. 55/1838. Bræv frá Pløyen til Rentukamarið dagfest 10. juli.

10 Kopibók fútans 1830-1837. Bræv nr. 4 av teimum, sum hann skrivaði á ferðini. Tey eru innførd í kopibókina eftir tey vanligu brøvini fyri árið 1836. Bræv til Rentukamarið dagfest 5. august.

11 Færø Amt Kopibók, Litra R, nr. 55/1838. Bræv frá Pløyen til Rentukamarið dagfest 10. juli.

12 Kopibók fútans 1830-1837, nr. 441/1837. Bræv til Rentukamarið dagfest 8. juni.

13 Færø Amt Innkomin brøv, Litra L, nr. 17/1838. Bræv frá Rentukamarinum dagfest 3. februar.

14 Færø Amt Innkomin brøv, Litra L, nr. 373/1838. Bræv frá Rentukamarinum dagfest 29. september.

15 Færø Amt Kopibók, Litra R, nr. 55/1838. Bræv frá Pløyen til Rentukamarið dagfest 10. juli.

16 Færø Amt Kopibók, Litra S, nr. 56/1838. Rundskriv frá Pløyen til sýslumenninar dagfest 20. desember.

17 Færø Amt Innkomin brøv, Litra L, nr. 547, 556, 564, 575, 588, 657, 720/1839.

18 Húskini á Slættanesi og Giljanesi eru undir Sandavági, og húskini í Víkum eru undir Gásadali.

19 Færø Amt Kopibók, Litra R nr. 162/1839. Bræv til Rentukamarið dagfest. 29. apríl. Hetta er árliga frágreiðingin um støðu landsins.

20 Færø Amt Innkomin brøv, Litra M, nr. 48/1840. Bræv frá M. Winther sýslumanni dagfest 19. mai.

21 Sorinskrivarin, Notarialprotokol 1840, folio 38-39. Gjøgnumgongd av málinum í sambandi við, at semja verður gjørd.

22 Færø Amt Skansaprotokol 1838 1/1 – 1843 21/2. 22. mai og 27. mai 1840, síða 161-162.

23 Færø Amt Innkomin brøv, Litra M, nr. 49/1840. Bræv frá Müller sýslumanni dagfest 23. mai.

24 Færø Amt Innkomin brøv, Litra M, nr. 293/1840. Yvirlit, sum amtskontórist Davidsen gjørdi.

25 Færø Amt Innkomin brøv, Litra M, nr. 293/1840. Yvirlit, sum amtskontórist Davidsen gjørdi.

26 Færø Amt Kopibók, Litra R, nr. 214/1839. Bræv frá Pløyen amtmanni til Rentukamarið dagfest 14. sept.

27 Færø Amt Kopibók, Litra R, nr. 214/1839. Bræv frá Pløyen amtmanni til Rentukamarið dagfest 14. sept.

28 Færø Amt Kopibog, Litra R, nr. 321/1840. Frágreiðing frá Pløyen til Rentukamarið dagfest 12. juni.

29 Færø Amt Kopibog, Litra T, nr. 96/1841. Frágreiðing frá Pløyen til Rentukamarið dagfest 12. november.

30 Færø Amt Innkomin brøv, Litra N, nr. 639/1843.

31 Suðuroyar sýsla, Diverse sager, Litra F, Landbrugsforsøg, nr. 617/1846.

32 Suðuroyar sýsla, Diverse sager, Litra F, Landbrugsforsøg, nr. 656/1847.

33 Færø Amt Kopibók, Litra R, nr. 55/1838. Bræv frá Pløyen til Rentukamarið dagfest 10. juli.

34 Kopibók fútans 1830-1837. Bræv nr. 42/1835. Bræv til Tillisch amtmann dagfest 29. september.

35 Færø Amt Skansaprotokol 1838 1/1 – 1843 21/2. 1. juli 1840.

36 Færø Amt Innkomin brøv, Litra N, nr. 639/1843.

37 Færø Amt Kopibók, Litra U, nr. 1211/1843.